

*Hendan myndin, sum brasilski fylgisveinurin GOES tók yvir Atlantshavinum, vísir tjúkk skýggj á leiðini, har tað franska flogfarið hvarv gjáranorgunin*

*(Mynd: Brasilska veðurstovan CPTEC)*

# Rakt av snarljósi ella hørðum turbolensi

**Franska Airbus-flogfarið datt eftir øllum at døma niður í Atlantshavið, eftir at eitt ella fleiri snarljós høvdu rakt tað. Tað mest sannlíka er, at snarljósið hevur elvt til okkurt skammlop, soleiðis at eldur er komin í tað. At flogfarið hvarv so brádliga av radaranum kundi sambært fleiri bent á, at eldur kom í brennievnið, og at flogfarið sprongdist**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Datt flogfarið niður, tí tað bleiv rakt av einum snarljósi, hava vit alla orsøk til at seta spurnartekin við, hvussu tey annars so álítandi Airbus 330-flogførini er bygd, skrivaði blaðið Times á sínari heimasíðu í gjár. Serefrøðingar, sum blaðið hevur tosað við, hella meiri til óvanliga harðligan turbolens sum frágreiðing um, hví flogfarið hvarv so brádliga av radaranum.

### Hendir fleiri ferðir árliga

Tey seinastu 40 árini er eingin stór flogvanlukka hend orsakað av, at eitt ella fleiri snarljós hava rakt eitt flogfar. Tað er rættiliga vanligt, at snarljós raka stór flogfør, men tað er sera sjáldsamt, at flogfarið fær nakran skað, tá snarljósið rakar skrokkin. Í hesum viðfangi kann verða nevnt, at sambært amerikonskum hagtølum verður eitt flogfar í regluligari flúgving rakt av snarljósi eina ferð um árið.

Harafturímóti kann ógvusligur turbolensur í "eyganum" á illveðrinum hótta sjálvt tey størstu flogførini, og tey flestu flogfeløgini broyta tí farleiðirnar fyri at sleppa uttan um tað ringasta.

Sambært teimum fyrstu upplýsingunum úr Fraklandi og Brasil vita myndugleikarnir har ikki, um vanlukkuflogfarið hvarv av radaranum orsakað av einum snarljósi ella onkrum álvarssomum breki.

### Seinastu boðini

Tey fyrstu tíðindini frá brasilska verjumálaráðnum søgdu, at tað franska flogfarið hevði havt trupulleikar við trýstinum inni í ferðafólkarúminum, og at flogfarið eisini hevði boðað frá trupulleikum við streyminum, áðrenn tað hvarv.

Sambært brasilska verjumálaráðnum var tað seinasta radiosambandið við flogfarið klokkan 22.33 lokala tíð. Tá hevði flogfarið samband við eftirlitsstøðina Brazilian Cindacta-3 Atlantic area á Recife. Hetta er ein av teimum fýra eftirlitsstøðunum, sum heldur eyga við brasilska loftrúminum.

Tá flogfarið setti seg í samband við Cindacta-3, var tað statt umleið 565 kilometrar frá býnum Natal, sum er við brasilsku strondina. Tá flogfarið aftur setti seg í samband við eftirlitsstøðina á Recife 50 minuttir seinni, boðaði flogskiparin frá, at flogfarið var á veg inn í senegalska loftrúmið 1.228 kilometrar frá Natal. Klokkan var nú 23.20 brasilska tíð.

Klokkan 22.48 fór flogfarið av radaraskíggjanum hjá Cindacta-3 við oynna Fernando de Noronha. Tá var flogfarið í 35.000 fóta hædd, og sambært brasilska loftferðslueftirlitinum sá alt út til at vera í lagi. Flogfarið hevði ikki samband við eftirlitið aftan á hetta, men nakað seinni fekk Cindacta-3 eina tekniska fráboðan um, at trýstið inni í flogfarinum var fallið, og at flogfarið hevði alaktriskar trupulleikar. Eftir hetta hoyrdist einki frá Air France-flogfarinum.

Franska flogfarið fór á flog úr floghavnini í Rio de Janeiro klokkan 19 sunnukvøldið lokala tíð (klokkan 23 okkara tíð). Hálvan fjórða tíma seinni, klokkan 22.33, hevði flogfarið radiosamband við loftferðslueftirlitið og var tá 565 kilometrar frá Natal við kós ímóti Dakar í Senegal. Flogfarið skuldi eftir ferðaætlanini seta seg í París klokkan 6.10 brasilska tíð (klokkan 10.10 okkara tíð).

### Helst turbolensur

Eftir tí, sum loftferðslumyndugleikarnir í Brasil og Fraklandi hava sagt, er tað greitt, at tað franska flogfarið var í einum tropiskum illveðursøki, og at flogfarið brádliga misti streymin. Alt samband millum eftirlitið og flogfarið slitnaði, og hvørvki flogskipararnir ella tann sjálvvirkandi fráboðanarskipanin sendi nakað neyðarkall.

Times skrivar, at tað er ikki óhugsandi, at eitt snarljós hevur fingið ein brennievnistanga at spreingjast og vísir á, at tað hendi eina ferð í sekstiárunum. Somu frágreiðing hellir fyrrverandi ovastin í Kastrup til.

Summir serfrøðingar hella kortini meiri til at geva turbolensinum skyldina, tí tað kann vera sera ógvusligur turbolensur í einum tropiskum illveðri. Eitt nú kann turbolensurin hava gjørt, at flogfarið er fallið so skjótt, at flogskipararnir hava mist tamarhaldið á tí, og at streymurin so er farin. Millum teirra, sum hella til hesa frágreiðingina, er tann franski vanlukkuserfrøðingurin Roman Hubert. Hann segði við franskt sjónvarp í gjár, at tað er alment kent, at fleiri smá flogfør eru farin á hendan hátt, og sjálvur helt hann tað mest sannlíka vera, at Air France-flogfarið hevur fingið somu lagnu. Formaðurin í flogskiparafelagsskapinum Cockpit, Jürg Handwerg, heldur tað sama.

- Tað er ikki serliga sannlíkt, at eitt snarljós er orsøkin til vanlukkuna. Tað kann heldur vera turbolensur, sigur hann við týska blaðið Spiegel.

*(Keldur: DR, TIMES, Aftenposten)*



# Regin W. Dalsgaard er Íverksetin 2009

**Á Ársins Íverksetaradegi fríggjadagin kunngjørdi Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri, at Regin W. Dalsgaard, er kosin Íverksetan 2009**

ÍVERKSETAN

Í einum fulsettum Listakála bar fyrst Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, eina heilsan til dagin, áðrenn dagurin varð settur av vinnumálaráðharranum.

Síðani helt stjórin í Íverksetarahúsinum, Rani Nolsøe, framløgu um týdningin av at arbeiða fyri at skapa eitt effektivt grundarlag fyri at fáa meiri íverksetan framda.

Framløgan fevndi eisini um eina video-presentatión av tveimum áhugaverdum verkætlanum, sum íverksetarnir Heri Schwartz, Jóhann Fagraklett og Grettir Hammer, saman við Íverksetarahúsinum, hava arbeitt við seinastu mánaðirnir.

Síðani greiddi Óla Kristian á Torkilsheyggi fangandi frá síni fyritøku NAVIA, sum nú er komin í ein áhugaverdan vøkstur.

Eftir ein steðg og inniligar tónar frá fløguaktuellu Guðrið Hansdóttir, trein ein dani á pallin, sum kallar seg The Madman.

At hann livdi fult og heilt upp til sítt navn kundu allir áhoyrarari sanna, tá sera lívliga framløgan endaði við, at øll fingu høvi til - í besta karate stíli - at bróta hópin av vælvaksnum fjalum í lutir tvá. Væl at merkja, um tann einstaki tordi at smekka til!

Tað tyktist, sum eingin av luttakarunum spardi seg tað allarminsta, tí tá roykurin legði seg, lógu hundraðtals sundursligdnar fjalar um alt gólvið.

Tann einfaldi boðskapurin hjá The Madman kann samankókast til vísuligu orðini: Tú skapar antin gleði tá tú kemur, ella tá tú fert. Valið er títt!

- Eftir væleydnaða tiltakið er lítið at ivast í, at Ársins Íverksetaradagur er komin fyri at verða, skrivar heimasíðan hjá Íverksetarahúsinum.